## Marek skiftir til MB



Norðlýsið skrivar, at Marek Wierzbicki í farnu viku flutti sítt spæliloyvi úr KÍ og til MB, har klaksvíkingurin Dánjal Jákup Joensen er annar av venjarunum. Í nógv ár taldist Marek millum bestu útlendsku spælararnar í føroysku kappingini, og hann hevur verið sera áhaldandi. Í fjør spældi onkran dystin á besta liðnum hjá KÍ sum 41 ára gamal. NÚ skal Marek geva MB eina hjálpandi hond í 2. deild.

## Gongur framá Chelsea

Enn noyðist Roman Abramovich at spræna pening inn í altíð tysta pengakassan í Chelsea, men seinasti roknskapurin staðfestir, at tað gongur framá. Hesa ferð var hallið hjá felagnum »bert« £74,8 mió. Inntøkurnar hjá felagnum settu í fjør met við £190,5 mió, men nóg mikið til at rinda útreiðslurnar var hetta tó als ikki. Seinastu trý roknskaparárini hevur Abramovich spýtt á leið 3 mia kr. í kassan hjá Chelsea, men um tvey ár er ætlanin, at roknskapurin skal javnviga, verður sagt.

# Føroyameistari í FIFA 08

**Eftir at 76 dystir vóru spældir, gjørdist tað greitt, at 16 ára gamli Mortan Mørkøre av Eiði er føroyameistari í FIFA 08. Hann vann finaluna eftir umdyst**

FÓTBÓLTSSPÆL
*Tíðindaskriv*

Skjótt eftir at kappingin var byrja sóu tey uml. 50 fólkini í vóru møtt upp, at Mortan var ein serstaka góður FIFA spælari. Hann tapti ongan dyst allan dagin.

Kappingin var skipa í 6 bólka har ið 4 og 5 lið vóru í hvørjum. Vinnarin av hvørjum bólki fór so víðari í ein fjóðringsfinalu, saman við tveimum av teimum bestu 2'arunum. Øll ið vóru møtt upp sluppu at spæla minst seks dystir. Tá ið bólkaspælið var liðugt, var greitt at Aksel, Verner, Høgni, Christiansen, Cotter, Rúni, Mortan og Høgni vóru teir í skuldu víðari til fjórðingsfinalurnar. Spenningurin var øðiligur og fleiri av teimum ið ikki komi víðari frá bólkaspælinum fylgdu væl við og heppaðu á sínar menn.

Í sjálvari finaluni var lagt upp til ein sannan gysara. Mortan kom framum eftir at Høgni hevði gjørt ein heldur keðiligan feil. Tó so, so svaraði Høgni aftur og kom uppá 2-1 áðrenn Mortan aftur var á blettinum og gjørdi tað til 2-2 sum var endaliga støðan áðrenn fari var til eykatíð. Her var tað Mortan, ið aftur dró tað longsta stráið og vísti sínar framúr dygdir sum FIFA 08 spælari.

Jógvan helt at hetta var ein sera væl eydna kapping og vóru fleiri í hildu at hetta átti at vera gjørt aftur. Men nú mugu vit so síggja tíðina ann. Jógvan helt eisini at høli hjá KÍ var sera væl egna til ein slíkan dag.

- Eg eri eisini sera væl nøgdur við okkara lut í hesum. Vit hjá EL-IN hava, við hesum eitt sindur annarleiðis tiltakinum, víst at vit hava eitt stórt úrval av tí nýggjasta innan playstation, spøl, sjónvarp og annað. Og so er tað bara fantastiskt at vit kundu fáa fólk ikki bara úr Klaksvík, men kring stóran partin av Føroyum til at vera umboð í hesari kapping, Segði Jógvan eftir tiltakið.





*Áhugin var sera stórur, tá FM-kappingin í FIFA08 varð skipað um vikuskiftið. Vinnarin, Mortan Mørkøre, sæst mitt í stóru myndini og annar frá høgru á ovari myndini*

**Hondbóltur**

SUNSET KAPPINGIN KVINNUR

| | dystir | v | j | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 16 | 14 | 1 | 1 | 471 | 360 | 111 | 29 |
| 2 VB | 16 | 9 | 2 | 5 | 376 | 344 | 32 | 20 |
| 3 Neistin | 16 | 10 | 0 | 6 | 395 | 369 | 26 | 20 |
| 4 Kyndil | 16 | 6 | 1 | 9 | 362 | 404 | -42 | 13 |
| 5 StÍF | 16 | 4 | 1 | 11 | 356 | 400 | -44 | 9 |
| 6 VÍF | 16 | 2 | 1 | 13 | 343 | 426 | -83 | 5 |

ATLANTIC AIRWAYS KAPPINGIN MENN

| | dystir | v | j | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 StÍF | 16 | 12 | 1 | 3 | 460 | 380 | 80 | 25 |
| 2 Neistin | 16 | 10 | 1 | 5 | 454 | 429 | 25 | 21 |
| 3 Kyndil | 17 | 10 | 0 | 7 | 459 | 457 | 2 | 20 |
| 4 VÍF | 17 | 6 | 2 | 9 | 455 | 479 | -24 | 14 |
| 5 H71 | 16 | 6 | 1 | 9 | 402 | 406 | -4 | 13 |
| 6 KÍF | 16 | 2 | 1 | 13 | 386 | 465 | -79 | 5 |

**Flogbóltur**

**Meistaradeild kvinnur**

| | dystir | v | t | vunnin sett | tapt sett | sett munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 SÍ | 15 | 14 | 1 | 44 | 10 | 34 | 17 |
| 2 ÍF | 15 | 13 | 2 | 41 | 16 | 25 | 16 |
| 3 Dráttur | 16 | 10 | 6 | 36 | 26 | 10 | 12 |
| 4 KÍF | 15 | 6 | 9 | 26 | 29 | -3 | 7 |
| 5 Mjølnir | 15 | 6 | 9 | 24 | 33 | -9 | 7 |
| 6 TB | 16 | 5 | 11 | 22 | 36 | -14 | 7 |
| 7 Fleyr | 16 | 0 | 16 | 5 | 48 | -43 | 0 |

**Meistaradeild menn**

| | dystir | v | t | vunnin sett | tapt sett | sett-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 SÍ | 10 | 7 | 3 | 27 | 12 | 15 | 11 |
| 2 Mjølnir | 9 | 6 | 3 | 21 | 14 | 7 | 7 |
| 3 ÍF | 9 | 5 | 4 | 21 | 19 | 2 | 6 |
| 4 Fleyr | 10 | 1 | 9 | 11 | 29 | -18 | 2 |